# Demokratia vil hava valfundir

Hesi skulu haldast í øllum kommunum, soleiðis at øll valevni hava møguleika at koma til orðanna. Í skrivi til politisku flokkarnar, kommunufeløg og kommunur ger Demokratia vart við, at slíkir valfundir eru eitt gott og neyðugt høvi hjá borgarunum at fáa innlit í tað, sum valevnini standa fyri og vilja arbeiða fyri, og harvið fáa eitt skikkað grundarlag fyri at velja, hvørjum tey skulu atkvøða fyri. Nú kommunuvalið nærkast, herðist stríðið um atkvøðurnar. Bæði í bløðunum og á portalinum síggja vit valgreinar og lýsingar, har valevni geva lyfti og heita á veljarar um at fáa atkvøðuna, skrivar Demokratia. Fyri valevni kann tað kosta nógvan pening at koma til orðanna, um einasti møguleiki er at skriva lesarabrøv í dagbløðunum ella at hava lýsingar, antin í bløðunum ella á internetinum. Hetta kann merkja, at fleiri valevni ikki hava møguleika fyri at verða hoyrd og at fáa sín boðskap út til veljararnar, sigur Demokratia í skrivinum.






*Peter S. Holm, stjóri í Smyril Line, sigur at farleiðirnar til Bergen og Scrabster verða niðurlagdar, og at framyvir verður bert siglt til Hanstholm um summarið. Restina av árinum verður siglt til Esbjerg*

# Bergen og Skrabster fara í søguna

**Smyril Line er í tungum sjógvi, og víðgongdar broytingar skulu gerast, skal botnlinjan gerast svørt aftur. Hesar broytingar innibera millum annað, at farleiðirnar til Bergen og Scrabster verða lagdar niður**

FERÐASAMBAND
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Innspræning frá landinum og Framtaksgrunninum er í sjálvum sær ikki nóg mikið til at bjarga Smyril Line. Víðgongdar broytingar verða gjørdar í siglingarætlanini hjá Norrønu, og nú verður bert fokuserað uppá tær ruturnar, ið geva mest av sær fíggjarliga, og sum flest fólk nýta.

Øll siglingarætlanin hjá Norrønu verður broytt, og hesar broytingar innibera millum annað, at farleiðirnar til Bergen og til Scrabster verða niðurlagdar, umframt at Norrøna bert fer at sigla til Hanstholm um summarið.

- Summarsiglingin verður nú broytt soleiðs, at Norrøna fer at sigla tvær ferðir um vikuna til Hanstholm og eina ferð til Seyðisfjørð. Um várið og heystið fer Norrøna framyvir at sigla einaferð um vikuna til Esbjerg og einaferð til Seyðisfjørð, og um veturin verður siglt til Esbjerg einaferð um vikuna, greiðir Peter S. Holm, stjóri á Smril Line, frá.

## Satsa upp á farmin

Broytingirnar í siglingarætlanini skulu eftir æltan geva Smyril Line meira burturúr farmasiglingini.

- Vit fara nú at satsa meira uppá farmasiglingina. Hetta merkir tó ikki, at vit fara at seta meira pláss burturav til farm, men at vit passa siglingina betri til vinnulívið í Føroyum, eitt nú fer Norrøna framyvir at verða í Havn sunnukvøld, soleiðs at handlarnir nú kunnu fáa frískt grønt mánamorgun. Vit passa eisini siglingina til soleiðs, at føroysku fiskaútflytararnir fáa meira burturúr, og hesar broytingarnar einsamallar eiga at fáa tølini á botnlinjuni at verða svørt aftur, sigur Peter S. Holm, stjóri í Smyril Line.

## Bíligari ferðaseðlar

Framyvir verður nú satsað meira uppá farleiðina til Danmarkar, og hetta er eisini tann mest nýtta farleiðin hjá ferðafólkunum. Saman við at siglingarætlanin verður broytt, fer Smyril Line eisini at lækka ferðaseðlaprísin.

- Seinastu árini hava vit hækkað ferðaseðlaprísirnar ov nógv, og hetta verður nú broytt. Vit fara ætlandi at lækka ferðaseðlaprísirnar aftur og gera tað meira lokkandi hjá ferðafólki at sigla við Norrønu, greiðir Peter S. Holm frá.

## Norrøna ikki seld í bræði

Tey eru nógv, ið vilja vera við at Norrøna ikki er egnað til okkara farvatn, og tað er Peter S. Holm eisini lutvíst samdur í. Men ætlanin er ikki at selja skipið í bræði.

- Norrøna er als ikki egnað til at sigla millum Føroyar og Ísland um veturin, og siglingarætlanin verður eisini broytt soleiðs, at Norrøna ikki siglir til Seyðisfjørð um veturin longur. Norrøna hevur ikki verið rætta skipið til siglingina, soleiðs sum hon hevur verið higar til, men nú vit laga siglingina til, verður Norrøna framyvir tað rætta skipið til siglingina, sigur Peter S. Holm.

Ætlanir hava verið at selja Norrønu, men tað, teir hava fingið bjóðað fyri skipið, hevur ikki verið nøktandi. Harafturat er Norrøna munandi bíligari at reka enn eldri og minni skip, og tískil liggur tað ikki í kortunum at selja Norrønu í løtuni.

- Men skuldi onkur bjóða okkum ein góðan prís fyri Norrønu, fara vit at umhugsa støðuna, sigur Peter S. Holm, stjóri í Smyril Line.

# Klára okku

**At politikarar nú ætla at lata Smyril Line almennan stuðul, vísir, hvussu lítið innlit teir hava í veruligu støðuna, sigur Joel undir Leitinum, stjóri í Samskipum**

STUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er fullkomiliga burturvið, at samgongan nú ætlar at lata Smyril Line almennan stuðul.

Tað staðfestir Joel undir Leitinum, stjóri í Samskipum, sum er rættiliga fortørnaður um, at eitt einstakt flutningsfelag nú skal fáa studning úr landskassanum.

- Hetta er sum at vera í Russlandi, áðrenn múrurin fall og samgongan átti at havt nógv annað at brúkt pengarnar til, leggur hann afturat.

## Klára okkum uttan Norrønu

Politikarar hava boðað frá, at landskassin er noyddur at stuðla Smyril Line, tí Norrøna er okkara motorvegur og okkara lívæðr út í heim og hana kunnu vit ikki kvetta av.

Samstundis vita góðar keldur hjá Sosialinum at siga, at fyri at bøta um rakstrurin, ætlar Norrøna í framtíðini at sigla nógv minni upp á Skotland og Noreg, ella kanska enntá at halda heilt uppat við teimum rutunum. Afturfyri skal siglast upp á Danmark tvær ferðir um vikuna, fyri at fáa størri part av farmaflutninginum.

Men tað er yvirhøvur ikki ein grundgeving, sum fær Joel undir Leitinum at blotna í knøunum.

- Vit klára okkum saktans uttan Norrønu. Hvat farmi viðvíkur, hava vit onnur flutningsfeløg, sum eru væl før fyri at átaka sær tað uppgávuna at tryggja farmin til Føroyar og úr Føroyum.

Hetta hevur Joel undir Leitinum eisini frætt, men hann skilir tað ikki.

- Farmaskip fyri 700 milli-

# Stuðul styg

**- At tað almenna pilkar einstakar fyritøkur burtur úr og stuðlar tær, fer at gera tað nógv ótryggari at gera íløgur í Føroyum, heldur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship**

STUÐUL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- At politiski myndugleikin gevur Smyril Line almennan stuðul, kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri føroyskt vinnulív

Tað heldur Jóhanna á Bergi, stjóri í Faroe Ship.

Hon hevur ikki hug til at gera tær stóru viðmerkingarnar, men hon heldur, at hetta er ein serstakliga óheppin ábending, sum vit nú fáa frá politiska myndugleikanum.

Hon staðfestir, at hetta er ógvuliga kappingaravlagandi mótvegis hinum flutningsfeløgunum.

Men tað, sum serliga ørkymlar hana, er signalvirðið, sum politiski myndugleikin sendir teimum føroyingum og útlendingum, sum kanska hava áhuga í at gera íløgur í vinnulív her á klettunum, sigur hon.

- Tað er ongin ivi um, at føroyskt vinnulív hevur tørv á íleggjarum, bæði før-